## Stillar ikki upp

Rættiliga óvæntað hevur leiðarin hjá demokratunum í amerikanska senatinum, Tom Daschle, boðað frá, at hann fer ikki at stilla upp til forsetavalið í 2004.

Seinastu vikurnar hava fleiri demokratar kunngjørt, at teir ætla at royna at gerast forsetaevni hjá flokkinum, og tey flestu høvdu væntað, at Tom Daschle fór at taka somu avgerð. Men í gjár boðaði hann frá, at hann ætlar sær at halda fram í senatinum og arbeiðinum har.

Eygleiðarar í Washington halda, at av teimum, sum higartil hava boðað frá, at teir ætla sær at royna at gerast forsetaevni hjá demokratunum, eru tað serliga tríggir, sum hava møguleika at vinna uppstillingarvalini. Teir eru leiðarin hjá demokratunum í umboðsmannatinginum, Dick Gephardt, og senatorarnir John Edwards og John Kerry.

## Lívstíð fyri trælahandil

Fýra kinesiskir menn fingu fyrradagin lívlanga fongsulsrevsing, eftir at rætturin hevði dømt teir sekar í at hava smuglað vietnamesiskar kvinnur til Kina og kinesiskar kvinnur til Japan. 38 aðrir menn fingu millum tvey og fimtan ára fongsul.

Kinesisku myndugleikarnir siga, at frá 1998 til 2000 vórðu umleið 700 kinesiskar kvinnur smuglaðar til Japan, har tær flestu endaðu í skøkjuhúsum. Í sama tíðarskeiði vórðu nógvar vietnamesiskar kvinnur smuglaðar úr Vietnam til skøkjuhús í Kina. Sagt verður, at smuglararnir neyðtóku nógvar av kvinnunum, áðrenn tær vórðu seldar øðrum.

Nógvar kinesiskar kvinnur vilja fegnar sleppa av landinum, og tær rinda javnan upp ímóti 20.000 amerikanskum dollarum fyri at sleppa við einum skipi. Sambært myndugleikunum enda nógvar av kvinnunum í útlendskum skøkjuhúsum.

## Nógvir samanstoytir

Ein uppgerð hjá norsku tryggingarfeløgunum vísir, at í fjør vóru meiri enn 500 samanstoytir í norsku ferðsluni um dagin, og at tryggingarfeløgini fingu fráboðan um meiri enn 600.000 skaðar.

Skaðarnir kostaðu tryggingunum 8,3 milliardir krónur, og tað var fimm prosent meiri enn í 2001. Sambært tryggingarfeløgunum er hetta alt ov nógv, og feløgini vísa samstundis á, at nógv tey flestu ferðsluóhappini stóðust av ósketni.

– Høvdu fólk lært at seta bilin frá sær, tá tey drekka, og høvdu fólk hildið seg innan fyri hámarksferðina, hevði talið á deyðum í ferðsluni verið helvtina minni, enn tað var í fjør. Tað vil siga, at 150 mannalív kundu verið spard, siga tryggingarfeløgini.

## Gary Glitter útvístur

Myndugleikarnir í Kambodja siga, at teir tóku heimskenda tónleikaran Gary Glitter annan jóladag, og at teir nú hava gjørt av at vísa honum av landinum.

Gary Glitter, sum í 1999 fekk treytaleysa fongsulsrevsing fyri at hava tikið niður barnapornografiskt tilfar á alnótini, rýmdi úr Bretland, tá hann slapp úr fongslinum, og síðani hevur hann fjalt seg í Kambodja. Men har hava fleiri felagsskapir kravt hann vístan av landinum orsakað av dóminum í Bretlandi.

Spurningurin er so, hvagar Gary Glitter skal fara. Bretsku myndugleikarnir hava boðað frá, at hann sleppur ikki hagar, og á Kuba hava myndugleikarnir givið somu boð.

# Eiturávaring í Bretlandi



*Tað drepandi eitrið í London varð funnið, beint eftir at bretska stjórnin hevur kunngjørt, at fleiri hermenn skulu til Persaflógvan, og at flogberin HMS "Ark Royal", sum sæst á myndini, eisini fer tann vegin.*

**Bretar eru ørkymlaðir, eftir at løgreglan hevur funnið tað drepandi eitrið ricin í einari íbúð í London. Seks menn úr Norðurafrika eru tiknir.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Tað var seinnapartin týsdagin, at bretska løgreglan kunngjørdi, at hon hevði lagt hald á tað drepandi eitrið ricin í einari íbúð har norðuri í London, og at seks menn úr Algeria vóru handtiknir.

Menninir hava síðani verið til avhoyringar, tí løgreglan vil hava at vita, um eitrið í íbúðini er tað einasta, sum menninir høvdu, ella um talan kann vera um eitur aðrastaðni eisini. Samstundis hevur løgreglan hert eftirlitið við tí muslimska umhvørvinum í London.

Myndugleikarnir meta tilburðin so álvarssaman, at heilsumyndugleikarnir hava biðið læknar, sjúkrahús og onnur halda eygað við, um fólk fáa sjúkueyðkenni, sum kunnu standast av ricin. Løgreglan hevur styrkt vaktarhaldið í undirgrundarbreytini, tí tað hevur fyrr ljóðað, at yvirgangsmenn hava havt ætlanir um at skipa fyri atgerðum har. Fleiri milliónir fólk nýta undirgrundarbreytirnar í London hvønn einasta dag.

Ricin er sera vandamikið evni, og læknavísindin hevur einki mótevni ímóti eitrinum. Evnið gjørdist heimskent, tí tað varð brúkt, tá tann útlagni bulgarin Georgi Markov varð myrdur í London í 1978. Hann varð stungin við einum regnskjóli, og tað vísti seg, at ricin var í sjálvum spíssinum á regnskjólinum.

Svenski yvirgangsserfrøðingurin Magnus Ranstorp segði í gjár, at hann hevur sæð tilfar um ricin í skjølum hjá al-Qaeda, men enn hevur bretska løgreglan ikki sagt nakað um, hvørt teir tiknu menninir úr Algeria hava samband við al-Qaeda ella ikki.

# Ikki einans nýggj Norrøna

**Nýggja Norrøna verður ikki einasta nýggja ferðamannaferjan, sum fer at sigla upp á Bergen og hanstholm í summar.**

SAMFERÐSLA
*Árni Joensen:*

Norrøna verður ikki tann einasta nýggja ferðamannaferjan, sum verður reglurligur gestur í havnunum í Hanstholm og Bergen í summar.

Norska reiðaríið Fjord Line hevur keypt eina ferðamannaferju, sum skal setast inn í siglingina millum Bergen og Danmark. Hon tekur 1500 ferðafólk og 600 bilar. Ferjan er keypt úr Avstralia og verður sett inn í siglingina millum Bergen og Hanstholm í apríl.

Enn hevur ferjan ikki fingið navn, og tey, sum halda seg hava eitt hugskot um eitt hóskandi navn, kunnu fáa 10.000 krónur og sleppa við á fyrstu ferðina, vinna tey navnakappingina, sum reiðaríið hevur útskrivað.

# Kann taka fleiri mánaðir at leita eftir vápnum í Irak

**Stjórin í altjóða kjarnorkustovninum IAEA sigur, at arbeiðið hjá vápnaeftirlitsmonnunum í Irak kann fara at taka fleiri mánaðir.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Mohamed El Baradei, sum er stjóri í altjóða kjarnorkustovninum IAEA, segði í gjár, at tað kann fara at taka nakrar mánaðir at fullføra arbeiðið, sum vápnaeftirlitsmenninir hjá ST gera í Irak.

Sambært seinastu samtyktini hjá ST-trygdarráðnum skulu vápnaeftirlitsmenninir lata ráðnum eina frágreiðing tann 27. januar, men talan verður ikki um eina endaliga frágreiðing, sigur El Baradei.

– Eg havi seinastu vikurnar sagt, at altjóða samfelagið noyðist at bera yvir við okkum, tí hetta arbeiðið tekur tíð. Kunnu vit avvápna Irak við eftirliti og kanningum og á tann hátt sleppa undan kríggi, haldi eg, at tað hevði verið tann besta loysnin, segði IAEA-stjórin í gjár.

Hann tók uppaftur, at enn hava eftirlitsmenninir hjá ST ikki funnið nøkur ólóglig vápn í Irak, og teir eru heldur ikki komnir fram á nakað, sum prógvar, at irakar hava sagt ósatt um sína vápnagoymslu og sín vápnaídnað. Men hann viðmerkti, at enn er nógv eftir at kanna, áðrenn tað ber til at gera nakra niðurstøðu.

Bilar
Nr. 5 • hósdagur • 9. januar 2003 • 77. árg.

# Mitsubishi Colt – til Evropa um eitt ár

**Hóast vit ikki hoyra so nógv til Mitsubishi persónbilarnar her um okkara leiðir fyri tíðina, er ein nýggjur Colt er komin á japanska marknaðin. Um eitt ár kemur Colt til Evropa**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hesin nýggi Mitsubishi Colt er gjørdur í samstarvi við Smart, ið hoyrir til stóru DaimlerChrysler konsernina. DaimlerChrysler eiga ein stóran part í Mitsubishi Motor Corp. Komandi ár kemur Smart við einum bili, sum er bygdur yvir sama plattform sum Colt. Colt er ein hatchback við 5 hurðum og rúmligari kabinu, har høgt er til loftið eins og á flestu nútímans bilum í hesi støddini. Baksetrið kann flytast aftur og fram, og stólaryggurin kann stillast. Eisini er baksetrið 5 cm hægri enn framsetrið. Bilurin fæst við 1,3 og 1,5 litur bensinmotorum við ávikavist 90 og 98 hk. Tá bilurin kemur á evropeiska marknaðin um eitt ár, verður eisini ein útgáva við trimum hurðum á skránni. Evropeiska og japanska útgávan verða ikki heilt eins.

*Kelda: Bil Magasinet*




*Hesin Mitsubishi Colt, ið er komin á japanska marknaðin, kemur til Evropa um eitt ár. Tá verður eisini ein útgáva við trimum hurðum á skránni. Evropeiska og japanska útgávan verða ikki heilt eins.*

# Visteon Corporation - undirhald til tey ferðandi í bilinum

Visteon

**Stóri amerikanski leverandørurin til bilídnaðin, Visteon Corporation, hava verksmiðjur í fleiri ymiskum londum í heiminum, ið m.a. framleiða billyktir, aircondition og multimedia undirhaldsskipanir til bilar**

MULTIMEDIA
*Magnus Gunnarsson*

Tað nýggjasta innan útgerð til bilar eru multimediaskipanir, har bilførarin hevur eina framkomna navigatiónsskipan at koyra eftir, meðan tey ferðandi í bilinum hava telduspøl, filmar ella annað undirhald á túrinum. Hetta er serliga ætlað børnum, sum ofta keða seg á longri túrum. Skíggjar til tey ferðandi sita undir loftinum ella á baksíðuni á nakkapútunum á framsetrunum.

Visteon Corporation framleiða eisini hita og aircondition-skipanir, kølarar, bilradio, fløguspælarar og nýggjar framkomnar lyktir til bilar, sum t.d. AFS (Advanced Front Lightning) bæði sum Halogen og Xenon. Hesar lyktirnar geva sera gott ljós í náttarmyrkri, í toku og ringum sýni um dagin. Visteon Corporation hava verksmiðjur í fleiri londum í heiminum við umleið 80.000 starvsfólkum.

*Kelda: Motor Magasinet*



*Visteon undirhaldsskipan í nakkapútunum*



*Visteon undihaldsskipan undir loftinum. Tá skipanin ikki verður brúkt, verður skíggin lagdur saman upp undir loftið.*